# Nú sæst ein endi

**Arbeiðið at byggja nýggja Smyril gongur framvegis væl og nú er av álvara farin at síggjast ein endi á**

NÝGGI SMYRIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Arbeiðið at byggja nýggja Smyril hevur gingið við rúkandi ferð seinastu tíðina og nú er av álvara farin at síggjast ein endi á.

Skipið broytist hvønn dag og hvønn dag síggjast fleiri og fleiri tekin um, at nú nærkast at hann verður heilt liðugur.

Nú er hann aftur farin í turrdokk og tá skal hann málast uttan. Um mánaðar-



*Her eru vit í eini ferðafólkasalong umborð og her sæst, hvussu bonkirnir fara at síggja út og teir síggja út til at vera bæði breiðir og góðir. Enn manglar tó borðið at verða sett upp. Annars hava leysasøgur gingið um, at bara leysir stólar vóru í ferðafólkarúmunum*



*Stores, sum er fremsta rúmið í skipinum, undir bakkanum, er nú fullkomiliga liðugt og læst*



*Nú eru eisini skrúvurnar farnar at mala og tá plagar ikki at vera nógv efti,til eitt skip er liðugt*



*Her er ein ferðafólkagongd á fimta dekki, har kømur eru*



*Her er ein gongd umborð.Ein hóming fæst av, hvussu gott pláss er umborð*